# Landaplágur á palli

**Leygarkvøldið 23. august skipar KÍ fyri stórari familjukonsert í KÍ høllini í sambandi við, at felagið fyllir 99 ár sunnudagin. Konsertin verður ein sokallað afturlítandi konsert, har fólk fáa høvi til at hoyra landaplágur frá seinastu tríati árunum**

KONSERT
*Solby A. Eliasen*



*Birgir Sigurðsson úr I Am er bert ein av teimum sjey, sum fara at framføra sokallaðar landaplágur á palli komandi leygarkvøld í KÍ høllini*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Konsertin er bara eitt av mongum tiltøkum, sum KÍ skipar fyri í sambandi við 99 ára dagin. Hvør minnist ikki løg sum Føroyar hjá Frændum, Til allar vinir hjá Blátt, Komið øll við hjá Straight Ahead, Torvatrøllið hjá Joka og so framvegis. Hesi og mong onnur verða at hoyra í KÍ høllini leygarkvøldið, so talan er um eina sera fjølbroytta konsert við lættum og melodiøsum løgum, sum klaksvíkingar gjøgnum seinastu tríati árini hava givið út. Og tað skuldi borgað fyri góðsku, tí hetta eru løg, sum fólk forelskaðu seg í fyri fimm, tíggju, tjúgu árum síðani ella longur aftur enn tað. Og tískil er hetta somuleiðis ein konsert fyri allar aldursbólkar.

Við á konsertini verða fleiri kendir sangarar úr Klaksvík, sum fara at syngja sokallaðar landaplágur, sum herjaðu kring landið í seyti, áttati og nítiárunum. Tað verða einir tríggir til fimm sangir í part til hvønn sangaran, so talan verður um einar 25 landaplágur í umleið tveir tímar komandi leygarkvøld.

Seinastu mongu árini er ein ørgrynna av landaplágum komnar úr Klaksvík frá bólkum sum til dømis Straight Ahead, Frændum, Hjarnar, Dynamitt, I am og Aria.

Tað verða tó ikki hesir bólkarnir, sum koma at luttaka á konsertini. Ein og sami bólkur, mannaður við Magna Husgaard á keyboard, Erik Biskopstø á bass, Høgna Klakkstein á trummum og Hjalta Joensen á guitar, spælir allatíðina undir, meðan sangararnir verða sjey í tali. Teir eru: Karl Martin Samuelsen, Steintór Rasmussen, Birgir Sigurðsson, Arnfríð Lützen, Jógvan Hansen, Jákup Marner Antoniusson og Hans Jacob Nystrøm. Gunnar Nolsøe verður vertur á konsertini, sum byrjar klokkan 21 og varir í umleið tveir tímar.

### Familjukonsert

Fyrireikararnir leggja stóran dent á, at hetta er ein familjukonsert, sum fer fram í hugnaligum umhvørvi.

– Tankin er, at øll skulu kunna koma, og tað skal verða ein hugnalig konsert, har øll hugna sær, siga fyrireikararnir. Og tískil liggur hon so mikið tíðliga á kvøldinum.

Tey siga seg ikki vita, hvat tey skulu vænta, men tað ber illa til at ímynda sær annað enn eina góða undirtøku. Tað er leygarkvøld, og hetta er ein konsert, sum bjóðar góðan og léttan tónleik.

Klaksvíkingar hava altíð verið kendir fyri at koma við fangandi popptónleiki, og tað er onki minni enn tað besta av tí besta, sum verður at hoyra í KÍ høllini leygarkvøldið.

– Vit hava simpulten tikið tað besta úr Klaksvík og koyra tað á pall í Klaksvík, siga fyrireikararnir, sum eru sera spentir upp á hesa konsertina.

Víst verður tó á, at tað eru nærum 15 ár, síðani at tað seinast var ein líknandi konsert í Klaksvík. Tað var aftur í 70´ini í 1989.

Hetta talið talar annars fyri seg. 15 ár síðani seinast, so tað er upp á tíðina, at okkurt tílíkt tiltak aftur er í Klaksvík, sum er við at verða rættuliga afturúrsiglt, tá tað kemur til konsertir og onnur tónlistarlig tiltøk.

Konsertin byrjar sum sagt kl. 21. Kostnaðurin er 120 krónur fyri vaksin og 50 krónur fyri børn 14 ár og yngri. Atgongumerkini verða seld við dyrnar.

# National Geographic gera film um Føroyar

**Heimskenda náttúru sjónvarpsrásin National Geographic hevur ætlanir um at koma til Føroyar at gera ein náttúrufilm. Ein amerikanari kemur hendanvegin í september fyri at gera fyrireikingararbeiði til filmin. Ólavur Sjúrðarberg, formaður í grindamannafelagnum, skal vísa honum runt í Føroyum**

FILMSGERÐ
*Solby A. Eliasen*



*Áhugin uttaneftir at gera filmar um Føroyar er alsamt vaksandi. Í summar hevur eitt franskt filmslið verið her, og í september kemur fólk frá heimskendu náttúrusjónvarpsrásini National Geographic hendanvegin*

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Ólavur fer kring landið við fólki, sum hava ætlanir um at gera film um Føroyar. Hann greiðir frá, at áhugin uttanífrá at gera filmar um Føroyar økist spakuliga. Og tað heldur hann kemst av, at tey sum hava verið her, verða væl móttikin og fáa fakta at vita um land, fólk og náttúru. Hetta heldur hann ger, at tey verða vælnøgd við túrin og siga øðrum frá.

– Tað eru hesir smáir ringarnir í vatninum, sum nú breiða seg meira og meira, sigur Ólavur.

Hann greiðir frá, at søgan um, at National Geographic skal gera film um Føroyar, byrjar fyri umleið tveimum árum síðani, og er eitt greitt tekin um, at tað eru teir smáu ringarnir, sum eru í ferð við at gerast størri og fleiri.

Fyri tveimum árum síðani vitjaði ein blaðkvinna frá Los Angeles Times í Føroyum. Hon búði hjá Ólavi í eina viku, og hann vísti henni runt í landinum. Hon skrivaði eina stóra grein um Føroyar í blaðið LA Times í mai mánaði í ár.

Og soleiðis bleiv nakað av ljósi varpað á okkara lítla oyggjaland í Los Angeles.

Ólavur greiðir frá, at tað eru fyritøkur í USA, sum gera filmar fyri eitt nú National Geographic, Animal Planet ella Discovery. Tað er ikki soleiðis, at rásin sjálv ger filmin. Og í september kemur so ein amerikanari frá eini tílíkari fyritøku hendanvegin til »research«. Tá viðkomandi setti seg í samband við Ólav, segði hann, at hann eisini kundi hugsað sær at fingið eitt grindadráp upp á band.

– Men eg mátti so bara siga honum, at tað kundi eg ikki garanterað honum. Eg greiddi honum frá, hvussu tað er við tí, men hann segði, at hann hevði áhuga í at koma kortini, tí hetta skal ikki verða ein grindafilmur, men ein náttúrufilmur, sigur Ólavur.

Hann er spentur upp á hetta sjálvandi, og hann heldur eisini, at tað er nakað stórt fyri Føroyar, at ein so kend sjónvarpsrás fer at gera film um Føroyar.

### Upplýsningar í smáum

Ólavur greiðir frá, at tá tað kemur til at lata upplýsningar út til umheimin gjøgnum ein miðil, so heldur hann, at tað er skilabetur at lata upplýsningar út í smáum, heldur enn at koyra alt út í einum.

Í hesum døgum eru onnur útlendsk eisini í Føroyum. Eitt franskt filmslið hevur verið her størsta partin av sumrinum og tríggir finskir studentar hava eisini verið her. Tey hava bandað upptøkur av práti við ymisk fólk, og tá tey koma heimaftur, skulu tey lata eina uppgávu inn, sum vísir broytingar í liviumstøðunum. Hesir finnar koma frá universitetinum í Helsinki, har tey eru farin í holt vi eina verkætlan, sum kallast »Snowchangeprojekt«.

Hesi millum onnur heldur hann fara at verða við til at geva nakað av upplýsningum um Føroyar út, og tað væntar hann kann fara at skapa størri áhuga fyri Føroyum við tíðini.

– Um alt verður koyrt út í einum, so er alt yvirstaðið beinanvegin. So kemur eitt upplop í áhuga, og so er tað líka skjótt yvirstaðið, sigur hann og vísir á, at tað hevur gongdin í útlendskum áhuga fyri Føroyum seinastu árini eisini víst.

Hann sigur eisini, at tey, sum hava verið í Føroyum við filmum ella øðrum fyri eyga, hava latið væl at teirri ferð.

– Tey hava verið fegin um teirra steðg her og siga seg hava verið vælmóttikin allastaðni, sigur Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum at enda.



Kappingarráðið:

# Ov lítil kapping á Føroyarutuni

**Ov lítil kapping er á Føroyarutuni, og verandi kapping fer fram á skeivum øki. Heldur enn at kappast um óviðkomandi ágóðar av bonusstigum, áttu flogfeløgini at kappast um sjálvan prísin á ferðaseðlunum, heldur Kappingarráðið. Maersk Air sigur seg vera fyri púra fríari kapping á Føroyarutuni**

KAPPING
*Rúnar Reistrup*



*Tú sparir null krónur um tú velur at flúgva við Altantic Airways heldur enn Maersk Air - ella øvugt, tí flogfeløgini kappast um alt annað enn prís.*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fyri tveimum vikum síðan kom Maersk Air við einum tilboði til kundar sínar um at teir kundu savna saman bonusstig og soleiðis vinna sær ymsar ágóðar. Sera stutt eftir svaraði Atlantic Airways átakinum hjá kappingarneytanum við einum líknandi átakið við bonusstigum.

Eingin ivi er um, at hetta er eitt tekin um vaksandi kapping millum flogfeløgini, tí tað er ikki ókeypis hjá flogfeløgunum at bjóða viðskiftafólki sínum ágóðar av hesum slag.

Men herðaða kappingin millum feløgini fer fram heilt á skeivum øki, heldur føroyska Kappingarráðið, sum ikki er nøgt við kappingarstøðuna á Føroyarutuni.

- Ynskiligt var, um flogfeløgini á Føroyarutuni fóru at kappast um at hava lægstu prísirnar heldur enn at kappast um alt møguligt annað uttanfyri sjálvan prísin, sigur Terje Sigurðsson á Kappingarráðnum, spurdur um hvat hann heldur um nýggju bonusskipanirnar hjá flogfeløgunum á Føroyarutuni.

Føroyska Kappingarráðið fer tó einki at gera við málið, tí tað er ikki teirra borð. Loftferðslumál eru danskt málsøki, og avgerðarrætturin liggur tískil hjá danska ferðslumálaráðnum. Sjálv Føroyarutan, sum Atlantic Airways og Maersk Air røkja, er undir strongum príseftirliti. Danska ferðslumálaráðið skal góðkenna allar prísbroytingar. Men tað merkir ikki at flogfeløgini á Føroyarutuni ikki sleppa at lækka prísin hvør í sínum lagi.

### Ikki ein króna á muni

Tað kann tykjast sum at kundin fær bæði í posa og sekk, tá hann fær »ókeypis« ágóðar frá flogfelagnum, um hann bara syrgir fyri at fáa eitt stempul í sítt bonuskort, hvørja ferð hann flýgur úr Føroyum.

Men ágóðarnir kosta, og tað er, so natúrligt, sum tað ljóðar, kundarnir, ið óbeinleiðis gjalda kostnaðin ígjøgnum ferðaseðlaprísin.

Í dag kostar ein fullur ferðaseðil millum Vágar og Keypmannahavn 5055 krónur, um hann verður keyptur frá Atlantic Airways og 5055 krónur um hann verður keyptur frá Maersk Air. Prísmunurin er snøggar null krónur. Sami prísmunur er millum bíligaru APEX ferðaseðlunum hjá báðum flogfeløgum.

### Búffar eru óviðkomandi

Sjálva prísleguna hevur Kappingarráðið onga viðmerking til, men kann bara staðfesta, at kappingin millum flogfeløgini ikki sæst aftur á føstu listaprísunum hjá feløgunum, og tað er í prinsippinum ósunt fyri marknaðin.

- Sum útgangsstøði halda vit, at fólk eiga at gjalda fyri tað, sum tey biðja um, nevniliga flogferðaseðlar, og ikki fyri onnur óviðkomandi ting so sum búffar og biografbilettir, sigur Terje Sigurðsson.

Tað ber til at vinna sær eina flogferð ígjøgnum bonusskipanirnar hjá báðum flogfeløgunum, um ein flýgur minst fimm ferðir úr Føroyum innan tvey ár. Men fyri at fáa tann ágóðan er neyðugt hjá flestu brúkarum at velja annað felagið út og flúgva við hesum hvørja ferð. Tað fremur ikki fríari kapping, sambært Kappingarráðnun.

- Ein bonusskipan leggur upp til kundaloyalitet, og tað er í sær sjálvum problematiskt, tí helst skulu kundarnir kunna skifta millum flogfeløgini so ofta teimum lystir, sigur Terje Sigurðsson.

SAS hevur leingi havt eina skipan við bonusstigum, sum eisini hevur verið galdandi á Føroyarutuni. Men hesari skipan hevur Kappingarráðið ikki somu mótstøðu ímóti, tí bæði flogfeløgini á rutuni brúka hesa skipan, og tí ber til hjá kundunum at vinna sær stig á somu skipan uttan mun til hvat flogfelag tey velja.

- Harumframt geva bonusstigini hjá SAS so at siga bert ágóðar, sum hava við ferðing at gera, meðan bonusskipanirnar á Føroyarutuni hava alskyns óviðkomandi ágóðar, sigur Terje Sigurðsson.

### Ynskja fría kapping

At kappingin á Føroyarutuni verður stýrd so neyvt, sum eftir núverandi skipan, er ikki ynskiligt sambært Kappingarráðnum.

- Eftir okkara tykki átti man at fingið gongd á fría kapping á Føroyarutuni. Tó vilja vit tilmæla, at kappingin fer fram undir skipaðum viðurskiftum og eftirlitið, tí annars er vandi fyri at annað felagið kann trýsta hitt av marknaðinum, og tað hevði verið tað ringasta sum kundi hent fyri kappingina á økinum. Men marknaðurin átti eftir okkara tykki at verið útsettur fyri størri kapping, enn hann í løtuni er, sigur Terje Sigurðsson á Kappingarráðnum.

Tað heldur í øllum førum annað flogfelagið á Føroyarutuni eisini. Per Brinch, kunningarstjórin hjá Maersk Air, sigur, at Maersk Air ynskir púra fría kapping á Føroyarutuni eins og hon er á øllum øðrum rutum, sum flogfelagið røkir.

- Tað er ein keðilig bureaukratisk forðing fyri kappingini, at allar prísásetingar skulu ígjøgnum danska ferðslumálaráðið, og hana vilja vit gjarna hava burtur, soleiðis at vit kunnu kappast frítt, sigur kunningarstjórin hjá danska flogfelagnum. Maersk Air heitti fyri fáum árum síðan á danska ferðslumálaráðið um at frælsgera kappingina á Føroyarutuni, men tað varð noktað.

At ferðslumálaráðið skal góðkenna prísirnar merkir tó ikki at ferðslumálaráðið krevur at prísirnir skulu vera fullkomiliga eins hjá teimum báðum flogfeløgunum. Spurdur um hví teir eru tað, sigur Peter Brinch, kunningarstjóri hjá Maersk Air.

- Tað er ikki vit, sum hava syrgt fyri tí. Vit hava sett tann ferðaseðlaprísin, sum vit halda vera rættur. Vit hava ikki hugt at hvat kappingarneytin selur sínar fyri, men vit kunnu staðfesta, at listaprísirnir eru púra eins.

Tað var tíverri ikki møguligt at fáa telefonsamband við Magna Arge, stjóra á Atlantic Airways, áðrenn evstamark.